# Tíðin

granskingarpengar. Men tíðin alleina skapar ikki genialitet og skaparaevni. Tað ræður um at geva teimum røttu fólkunum tíð og umstøður.

### Arbeiðstíð og persónlig tíð

Tað skil, sum tað bar til at halda á tíðini við teimum fyrstu álmanakkunum, er vorið alsamt ment og gjørt alt fjølbroyttari. Tað eru heldur ikki so nógv ár síðani, at ein sonevndur "Time-manager" var "inn". Hann var næstan líka stórur sum ein bíblia, har tað bar til at skriva upp og planleggja alt, sum hevði við bæði arbeiðslív og privatlív at gera. Tað vóru givin skeið í, hvussu hesin time-manager skuldi nýtast, og lærdi tú at brúka hann rætt, vóru tað næstan ongar avmarkingar, hvussu tú kundi leggja lív títt til rættis, heilt niður í minstu smálutir. Time-manager-fólkini vóru eitt serliga effektivt og vælfyriskipað fólkaslag. Bert tað tey tuskaðu við time-manegar-anum í hondini, á sama hátt, sum tey nú ganga við hesum kombineraðu fartelefonunum og smáteldunum. Men mistu tey time-managaran burtur, so var neyðin í durinum, tí so dugdu tey ikki at venda sær longur, tí alt stóð í managaranum, sum var teirra leiðbeinari tíma fyri tíma.

 Eg minnist einaferð eg var við til at hjálpa onkrum at flyta í eina nýggja íbúð. Hvussu var og ikki, so var time-managarin komin at liggja undir øllum flytigóðsinum, og tað bar ikki til at koma at honum í bræði. Eigarmaður hansara var so ólukkuligur, at hann setti seg at gráta. Sjóheitan grát. Hvat skuldi hann nú gera. Hann visti hvørki hvussu hann skuldi passa konuna ella sítt arbeiði.

Stressmappur og time-managarar eru ikki inn longur, nú skulu fólk ikki vísa sítt stress, men verða væl trimmaði og úthaldandi.

Men tað vóru eisini teir, sum um somu tíð sum time-managerarnir myndaðu tíðina, kundu klára seg við minni. Eg minnist, at Erlendur Patursson sáli ein dagin hann var og tosaði við meg á skrivstovu míni á Fornminnissavninum, har eg tá arbeiddi. Hann tók tá ein samanlagdan álmanakka frá Tøtingarvirkinum í Gøtu upp úr lummanum og skrivaði okkurt á hann, sum hann skuldi minnast til. Meira kravdi hesin tjóðskaparmaður ikki fyri at halda stýr á sínum lívi.



*"At hitta fólk á telefon ber næstan ikki til longur, tí tað er so litil avlopstíð til tað í sjálvari arbeiðstíðini. Ofta sleppur tú ikki longur enn at hoyra móttakaran spæla tónleik, men kanska onkur skrivari er, sum kann geva tær boð. Tað tekur tíð at fáa fatur í fólk í telefon, tí sum eingilsmenn siga tað, "a busy man is never in his office".*



### Elektroniski kallendarin

Útboðið av størri og minni kallendarum er vorðið ógvuliga stórt og liggur frammi í bókhandlum seint á heysti og uppundir jól, men teir imponera ikki fólk longur, tí vit mugu minnast til, at kallendarar eisini finnast í hvørji fartelefon og í øllum teldum og ikki minst í øllum kombinatiónunum av fartelefon og telduhvølpum.

Fartelefonin er eitt rættiligt sambandstól. Serliga ung fólk og eisini børn hava gjørt sær dælt av hesi samskiftistøkni, har tað ikki bert ber til at tosa saman, sms-a, men tað ber eisini til at senda hvørjum øðrum myndir. Meðan tey sita og eta jóladøgurðan ber til at leggja til rættis restina av degnum ella kanska mest náttini, saman við vinfólkum, sum eru heilt aðrastaðini í landinum.

Fartelefonen hevur ein so stóran týdning hjá ungdóminum í dag, at tey ikki vilja sleppa henni úr hondunum, í øllum førum ikki longur enn tey kunnu taka hana straks, um hon skuldi givið lívstekin frá sær. Eisini hjá okkum eldru, sum í fyrstanini vóru eitt sindur trek at fáa sær hetta snurrandi lummatólið, eru fallin til fartelefonina. Sjálvt ommur kunnu læra seg at senda sms.

Hinvegin er alt nú blivið so smart, at tað ber til at sameina teldu og fartelefon og senda upplýsingar ímillum so tú so at siga hevur alt á sama kallendara. Hetta skal vera ein av orsøkunum til, at býráðslimirnir í Havn hava fingið so fínar fartelefonir. Jú, allir møguleikar eru til hjá teimum at tráðroyna hvørt sekund og arbeiða á telduni alt samdøgurið, uttan mun til hvar teir eru stæddir.

Á flestu skrivstovum er tað soleiðis, at tað ber til at sláa upp á kallendarunum hjá hvørjum øðrum fyri at finna leysa tíð ella eina leysa stund at hittast. Í nógvum førum eru tað skrivararnir, sum halda skil á tíðini eisini hjá stjórum teirra. Á henda hátt verður tað alt meira kallendarin, sum kemur at stýra einum fólki, enn fólki sjálvt. Tað ber sjálvandi til at avlýsa eina óhepna avtalu og tað hendur ikki so sjáldan.

Herfyri ætlaði eg mær at hitta ein av okkara stóru monnum og ringdi til skrivara hansara, um eg kundi fáa avtala tíð. Jú, hon skuldi straks hyggja eftir í kallendara hansara fyri at vita, um hann hevði nakra avlopstíð. Tað hevði hann ikki ta vikuna, men næstu viku var eitt glopp í kallendaranum, har hon kundi skriva meg inn.

At hitta fólk á telefon ber næstan ikki til longur, tí tað er so litil avlopstíð til tað í sjálvari arbeiðstíðini. Ofta sleppur tú ikki longur enn at hoyra móttakaran spæla tónleik, men kanska onkur skrivari er, sum kann geva tær boð. Tað tekur tíð at fáa fatur í fólk í telefon, tí sum eingilsmenn siga tað, "a busy man is never in his office".

Harafturat so kanst tú uttan mun til hvør tú ert, ikki venda tær til ein og hvønn persón í einum aðalráði, um so er at tann persónurin, sum tú vilt hava fatur á, ikki er at hitta. Tú skalt venda tær til tað fólkið, sum í leiðsluskipanini hevur málini hjá tínum stovni um hendi og ongan annan. Alt annað verður á modernaðum nýføroyskum fyrisitingarmáli rópt at *by-passað* úttalað beipassað. At venda tær beinleiðis til stjóra ella aðalstjóra fyri ikki at siga landsstýrismann, er fyrisitingarliga sera ódannað ella sera grov by-passing, sum helst kemur tær aftur um brekku, um tú skuldi funnið uppá tað. Tað er tíðin ikki beroknað til.

Her eru teldubrøvini, sum tú nærum altíð kann senda frá teldu tíni ein góð hjálp. Við teimum ber tað til næstan til at seta tíðina út av funktión eina løtu. Teldubrævið ella meylið kemur beinleiðis á telduna hjá tí, sum tú sendir tað til. Tað ger eisini vart við seg á skýggjanum. Yvirhøvur eru embætisfólk sera fitt til at svara, tey kunnu eisini, um væl veit við ringja til tín eftir at hava fingið ein teldupost. Hetta veit eg frá mær sjálvum.

Sjálvandi er ikki øll tíð á kallendaranum arbeiðstíð. Tað má vera eitt sindur av luft í kallendaranum hjá einum stjóra, tí um tað altíð er fult, fær hann ella hon ikki stundir til at hugsa – fyri ikki at siga nýhugsa, og tað er tað sum stjórar fyrst og fremst eru settir til í dag.

Tað ber tí eisini til at seta løtur av i kallendaranum til okkurt frítíarítriv, bowling, renning, ella til at fara á flot, um tað er góður streymur.

Hjá teim flestu vælskipaðu fólkunum er tí lítil avlopstíð. Ein vinmaður mín helt her fyri ein fyrilestur í donskum høpi, um *kvalitetstid til familien*. Inspiratiónina til fyrilesturin hevði hann fingið frá gifta soni sínum, sum gramdi seg um, at hann hevði ov nógv at gera og tí lítið av kvalitetstíð til lítla son sín, og tað harmaði hann.

Spurningurin er so, hvat hann meinti við kvalitetstíð. Tað verður so ofta tosað um